# Syndabukkar á dagsskránni

HELGI ABRAHAMSEN
løgtingsmaður



Munnligir fyrispurningar stóðu á skránni fyri tingfundin seinasta mikudag. Í yvirlitinum yvir spurningarnar stóð millum annað, at Hans Pauli Strøm skuldi spyrja Rósu Samuelsen um syndabukkar.

Hóast yvirskriftin kundi virka forvitnislig, so vistu øll frammanundan, hvat spurningurin snúði seg um, tí tað hevði Hans Pauli greitt væl ov virðiliga frá í fjølmiðlunum. Hann hevði sagt, at almenn starvsfólk skuldu ikki vera syndabukkar hjá landsstýriskvinnuni í almannamálum. Týðuligt var tó, at veruliga endamálið við fyrispurninginum var at gera landsstýriskvinnuna sjálva til okkurt slag av syndabukki hjá Hans Paula Strøm.

Sjálvandi hevur Hans Pauli rætt í tí, at stovnsleiðarar kunnu ikki ábyrgdast fyri sparingarnar á fíggjarlógini, men hinvegin, so kann landsstýriskvinnan heldur ikki ábyrgdast einsamøll fyri hesar sparingar.

**Heilivágsútreiðslur**

Í fyrispurninginum nevnir Hans Pauli Strøm nakað, sum hann kallar ”óhepnu avleiðingarnar av skerjingini, sum hon” (landsstýriskvinnan) ”hevur framt av heilivágsstuðlinum til pensjónistar, diabetikarar og varandi sjúk”.

Nú vit tosa um syndabukkar, so veit Hans Pauli Strøm, at tað eru fleiri orsøkir til, at heilivágurin er blivin dýrari. Ein orsøk er uppskotið hjá Rósu Samuelsen, sum hevði til endamáls at rætta nakrar skeivleikar í sambandi við, at lógarheimildin fyri stuðulsskipanini ikki var í lagið.

Ein onnur orsøk var eitt spariuppskot hjá Hans Paula Strøm, sum hevði til endamáls at lækka tilskotið til heilivág, soleiðis at brúkarin sjálvur skuldi rindaði ein størri part av útreiðslunum.

Ein triðja orsøk var, at tilskotsnevndin gjørdi onkra broyting, sum hevði við sær, at ávísir sjúklingar mistu stuðulin.

Tað virkar løgið, at Hans Pauli Strøm, sum eigur sín part av hækkaðu gjøldunum, bara nevnir tann partin, sum Rósa Samuelsen hevur staðið fyri, samtíðis sum hann ávarar ímóti at gera onnur til syndabukkar.

**Javnaðarflokkurin stuðlaði uppskotinum**

Viðvíkjandi uppskotinum hjá Rósu Samuelsen, so var tað eitt lógaruppskot, sum varð beint í trivnaðarnevndina. Har tók millum annað umboðið hjá Javnaðarflokkinum undir við uppskotinum og mælti løgtinginum til at samtykkja tað. Bæði við 2. og 3. viðgerð atkvøddu øll í Javnaðarflokkinum fyri uppskotinum.

Landsstýriskvinnan hevur sjálvsagt ábyrgd av at hava lagt eitt uppskot fyri tingið, men samgongumeirilutin í løgtinginum hevur sanniliga eisini ábyrgdina av at hava atkvøtt fyri uppskotinum.

**Øll eiga sín part**

Fyri mær hevur tað ikki so stóran týdning, hvørji landsstýrisfólk leggja tey einstøku uppskotini fyri tingið, tí vit eru ein samgonga, og vit mugu øll standa saman um førda politikkin, um nakað skil skal vera í. Men eg haldi ikki at tað sømir seg einum tingmanni og fyrrverandi landsstýrismanni, at gera landsstýriskvinnuna í almannamálum til einsamallan syndabukk fyri tí politikki, sum øll samgongan stendur aftanfyri.

# Altjóða flogvøllur einaferð enn

FRANK DAVIDSEN
Sørvágur



Tað, sum fyrst og fremst fekk undirritaða at gera viðmerkingar um altjóða floghavn, vóru tær sera tunnu og veruleikafjarðu grungevingar, ið Bjarni Djuurholm og Sjúrður Skaale førdu fram herfyri. Millum annað at ferðavinnan og útflutningurin av feskum fiski skuldu fíggja tvær milliarda íløgu í nýggjan flogvvøll.

Nú kemur so Petur Hermansen við tí triðju grundgevingini fyri at byggja nýggjan flogvøll - á Glyvursnesi sjálvandi.

Her sigur hann, citat: »tann sum vil Føroyum eina trygga flogferðslu frameftir og at charterferðir til Føroyar úr øllum heiminum kunna gerast veruleiki, flytir flogvøllin beinavegin, so at ikki hasar 400 milliónirnar fara til onga nyttu.«

Jamen er tað ikki heilt einastandandi, at meðan vit hava eitt fíggjarlógarhall upp á næstan eina millard, og at tað stendur á at fáa pening til sjúklingaflutning til Danmarkar, so meta hesir menn tað sera náttúrligt og einfalt at gera milliarda íløgu í nýggjan flogvøll.

Avleiðingin verður so sjálvandi, at umleið 12% av vágafólkinum verða koyrd út í arbeiðsloysi. Samanbera vit tað við íbúgvaratalið í Tórshavn, so vóru 2500 fólk koyrd út í arbeiðsloysi.

Eg haldi meg ikki bara hava rætt, men kenni tað eisini sum mína skyldu at tala at, tá nakrir einstaklingar koma við einum prestiguprojekti, ið Glyvursnes-ætlanin hevur verið frá byrjan av.

Partamennirnir hjá Peturi Hermansen sótu í samfull 8 ár í landsstýrinum og bøldu oman á yvirtøkuni av flogvøllinum. Fyrst Finnbogi Arge og síðani Bjarni Djuurholm. Teir royndu øll kynstur at klandrast við danir fyri at útskjóta yvirtøkuna, soleiðis at hon ongantíð var framd. Teir vistu sum var, at meira teir niðurpíndu Vága Floghavn, sum eisini eyðnaðist teimun, størri vóru møguleikarnir fyri, at deyðadómur var feldur yvir verandi flogvølli.

Tað var nærum eyðnast teimun, um ikki Jóannes Eidesgaard tók málið í egnar hendur og gjørdi eina avtalu við danir um at leingja verandi flogvøll.

Taka vit so grungevingarnar hjá Peturi Hermansen, so ger hann vart við, at fáa vit ein longri flogvøll á Glyvursnesi, so, hokus pokus, verður tann ætlanin borðbar, tí so kunnu charterflogfør úr øllum heiminum lenda har.

Álvaratos, longu í áttatiárinum skipaði Trygvi Askham fyri charteferðum til Suðureuropa, so at grundgeva at niðurlegging verandi flogvølli við, at hann er ov stuttur til charteferðir, tað vísur okkum øllum, hvussu lítið álvara er í grungevingunum hjá tí annars sera skilagóða Peturi Hermansen.

Satt at siga so var eg óvitandi um, at ætlaði flogvøllurin á Glyvursnesi hevði 10 kilometrar av sjógvi í báðum endun á vøllinum. Hinvegin so eri eg vitandi um, at tøknin í dag ger tað gjørligt at lenda í sera ringum sýni, um veður og vindur annars er til vildar. Sjálvsagt er tað ikki bert mjørki, íð kann gera seg galdandi, men tað er júst tað mistakið, sum mótstøðumennirnir av Vága Floghavn gera seg sekar í. Tí líka mikið hvar ein vøllur verður lagdur, so eru vit framvegis í Føroyum við teimun sera skiftandi veðurviðurskiftum, ið valda her. Eisini á Glyvursnesi, har til dømis síðuvindur fer at gera seg nógv galdandi.

Ein onnur grundgeving hjá Peturi er, at fleiri eru tey, ið ikki hætta sær at flúgva undir verandi umstøðum. Í tí sambandið haldið eg, at hagtølini siga sína søgu. Hon vísir, hvussu lítið innihald er í royndunum at niðurgera Vága Floghavn. Í 1970, minnist meg rætt, vóru umleið 10.000 ferðandi, meðan tað í 2008 vóru, haldið eg, omanfyri 250.000. Hettar er helst heimsmet í vøkstri, sum eingin annar flogvøllur í heiminum kann vísa á.

Og um hugin at flúgva annars, so kann ein til stuttleikar vísa til Gekkin, har so at siga øll, sum raka gulu lúkurnar, velja flogseðlarnar hjá Atlantsflog.

Men viðvikjandi álopinum hjá Peturi á trygdarviðurskiftini á flogvøllinum, so vil eg bara mæla honum til at venda sær til Statens Luftfartsvæsen um tað.

# Ørkymlandi støða

Orðaskiftið í ”Hvonn live” leygarkvøldið avmyndaði eina ørkymlandi politiska støðu. Onkur av luttakarunum nýtti entá orðið kaos um samstarvsviðurskiftini millum samgonguflokkarnar. Nógv orka varð nýtt til tjak um fortíðina. Síggja vit burtur frá munnhøggarí um hvat, ið hendi undir fullveldissamgonguni og hvat, ið hendi undir fyrru ABC samgonguni, so avdúkaði orðaskiftið millum Høgna Hoydal, Jóannes Eidesgaard og Jørgen Niclasen nakrar álvarsamar politiskar trupulleikar, sum samgongan hevur trupult við at loysa. Orðaskiftið avdúkaði eisini, at partarnir aftan fyri ólavsøkupakkan eru avgjørdir um at fremja pakkan. Spurdur um Javnaðarflokkurin ikki var hvokkin av veljarakanningini, svaraði Jóannes, at flokkurin rak ikki politikk eftir veljarakanningum og hann endurtók síðani tað, sum hann áður hevur sagt, nevniliga, at vælferðin skal skerjast. Hann vísti í hesum sambandi til nútímans javnaðarflokkar, sum ikki himpraðust við at skerja vælferðina.

Javnaðarflokkurin letur seg sostatt hvørki ávirka av norska valinum ella vánaligu veljarakanningini. Tað er torført at gita, hvat liggur aftan fyri hesa harðrendu støðu, sum heilt opniberliga kostar flokkinum atkvøður. Hetta kann helst tulkast sum enn eitt greitt signal til samgonguparternar um, at Javnaðarflokkurin fer ongan veg – ella við øðrum orðum ein roynd at mana leysasøgurnar um, at flokkurin er á veg út úr samgonguni í jørðina.

Samantikið vísti orðaskiftið tveir samgonguflokkar, sum ætla at halda saman til tann beiska enda. Jóannes og Jørgen vóru samdir um, at fíggjarlógin fyri 2010, sum er á veg á tingborð, skal vera sveinastykkið hjá ABC 2 samgonguni. Megnar samgongan at semjast um eina fíggjarlóg innan teir karmar, sum samgongan sjálv hevur sett sær, so heldur hon valskeiðið út. Tað kann væl vera, men so kann verða spurt, hvussu valúrslitið hjá Javnaðarflokkinum fer at síggja út í mun til veljarakanningina. A og B fara ivaleyst at standa seg, tí politikkurin er júst tann, sum teirra veljarar forvænta. Kann tað sama verða sagt um støðu Javnaðarfloksins?

Høgni Hoydal var sum vera man tann beiski, sum stendur uttanfyri. Hann var afturlítandi at fullveldissamgonguni, sum Fólkaflokkurin hevði beint fyri, vísti á øll tey mál hjá CHE, sum fóru fyri bakka orsakað av samgonguslitinum, eitt nú fiskivinnupolitikkurin, útbúgvingarpolitikkurin og mentanarpolitikkurin. Tað tóktist, sum Jóannes hevði hug at geva honum rætt við tað, at hann óbeinleiðis viðgekk, at tað neyvan bar til at reka burðardyggan fiskivinnupolitikk við ABC 2.

Tað er áhugavert, at eitt nú Jóannes Eidesgaard nevndi nýggju valskipanina sum orsøk til tað kaos, sum valdar millum tingmenn. Nú landið er eitt valdømi, nýta ávísir tinglimir nógva orku til at markera seg. Vit hava her áður víst á hendan trupulleikan, sum er væl kendur í londum við somu skipan. Tað kann uttan víðari staðfestast, at politiska støðið ikki er hækkað av nýggju skipaninini. Tað er ikki vorðið lættari at stýra landinum, eitt nú tí nýggja valskipanin krevur ein politiskan búnaskap, sum alt ov nógvum tingmonnum manglar.

**Sosialurin**